


**Klaksvíkar Hornorkestur, sum hevur sett dám á stevnur og hátíðarhald í 50 ár**

*Framhald av síðu 17*

andróður eystur um Kalsoyarfjørð og inn á Pollin.

Undir kappróðrinum rógva seksmannaførini 1500 metrar í einar 7 min. og 40-50 sek. Tá Blankskálamenn fyri eini 200 árum síðani róðu heim av Skallunum við seksmannafarinum, rendu teir seg í ringt veður, hann ruskaði lágt og teir fingu harðasta andróður, og tað var ikki hugsingur um at koma inn undir Nakkin. Har vóru eingin onnur ráð enn at hava stavnhald ímóti Viðareiðishelluni. Teir vunnu heim fyri Torvuna, men fingu tá eina glaðu so harða, at teir fingu ikki bátin upp ímóti aftur og róku norð um Viðoynna. Har lógu teir so alla náttina og andøvdu. Kvøldið eftir gekk hann vesturá, og um náttina settu teir upp í Eiðsvík. Tá høvdu teir róð harðasta andróður í 27 tímar! Og so stríggin hevði hesin róður verið, og so útlúgvaðir vóru hesir sterku menn, at tveir av teimum doyðu av møði í bátinum!

Hesar báðar søgurnar eru ikki serstakar, men bert tvær í teirri longu røðini, sum ætt eftir ætt, øld eftir øld høvdu kunnað sagt frá. Søgan um hin føroyska bátin og søgan um útróður við árum er søgan um stríð og strev. Hettar sigi eg ikki, tí mær ikki líkar tjóðarídrótt okkara, tvørtur ímóti haldi eg sjálvur, at kappróður er ein hin vakrasta ídrótt, men vit mugu ikki gloyma røturnar hjá bátinum, og vit mugu ikki gloyma, at tíðin og tíðarhugtakið er heilt øðrvísi í dag enn fyrr.

Arbeiði á landi og á sjógvi tók tað tíð tað tók, og tað var einki hóvðasták gjørt burturúr. Ein útróðrarmaður tekur ongantíð til, at eg var á útróðri í 10 tímar. Tað er púrasta órelevant. Vit høvdu 48 stampar við og fingu so og so nógv, sigur hann. Hvussu leingi tað var, er enn órelevant, tað veldst um, hvar tað verður sett, hvussu veðrið var og hvussu nógv lína var við, so kann tað vera alt frá 10 tímum til eitt døgn. Sum Jóanes Nielsen einaferð so rámandi hevur sagt tað, so eru sjómenninir kanska teir einastu av okkum føroyingum, sum eiga eitt sindur av róligheit eftir, tí samstundis sum sjólívið kann vera strævið og rokut, so eiga garvaðir sjómenn eina róligheit, sum ikki er so vanlig millum fólkið á landi. Úti á sjónum eru ongi posthús, handlar, bankar, sjúkrakassar, ølklubbar, biografar, besinstøðir, pylsuvognar dansihølir og vit kundu lagt afturat, internetcaféir, at fara til. Allastaðni møtir lúnningin, og tann sum hevur lært seg kynstri at liva í hesum rimaleysa búrinum hevur í tíðir og allar ævir fingið saltrákan í æðrarnar. Umborð hevur tú tíð til onnur enn teg sjálvan, og tú lærir ella mást læra teg at lurta eftir honum undir liðini á tær, tí har er ongin annar og har er heldur ongastaðni at fara, júst sum støðan var í gamla og avbyrgda bygdasamfelagnum.

Okkara vælferðarsjúka tykist verða “ikki at hava tíð”. Dagurin hjá okkum er skemalagdur, frítíðin er skemaløgd. Allir møguligir “time-mannegjarar” eru uppfunnir, bæði manuellir og elektroniskir, og alt rundan um okkum prentar niður í okkum, hvat klokkan er. Hugsa bara um morgunsendingarnar hjá útvarpinum: “Klokkan er fimm minuttir yvir hálvgum átta.” “Klokkan er sjey og ein hálvan minutt yvir hálvgum átta.” “Klokkan er tíggju minuttir yvir hálvgum átta” —og hvat í Harrans navni skal alt hetta til? Tá vit skula verða saman við børnunum tosað vit um kvalitetstíð. Hvat í allari víðu verð er kvalitetstíð? Kann nakar siga mær tað?

4. oktober 1957 er heldur ikki ein dagur, sum stendur í øllum søgubókum og slett ikki ein dagur, vit hava lært okkum uttanat. Henda dagin í 1957 sat amerikanski verjumálaráðharrin á fundi við raketserfrøðinginum Werner Von Braun. Fundurin varð avbrotin, tí vísindamenn høvdu rakt við signal úr rúmdini. Hesi signal komu frá einari 84 kg. tungari blikkdós, sum sveimaði um jørðina. Henda blikkdós var hon, vit seinni komu at kenna sum Sputnik, og hesin dagurin, 4. oktober 1957, er av summum søgufróðum fólki sagdur at vera byrjanin til KT-kollveltingina, hin størsta og mest broytingarskapandi kollveltingin síðan Ídnaðarkolveltingina, ið byrjaði seinast í átjandu øld.

Vit liva í dag anno 2000 mitt í hesi kollvelting, og eingin veit, ella hevur tamarhald á, hvat hendir ella hvagar leiðin gongur, annað enn at teldurnar ganga skjótari og skjótari. Sjálvt eg fati ikki, at eg enn í dag skal skriva @ við tveimum tastum. Internetið býður seg fram og lovar, at vit kunna fáa alt skjótari og skjótari. Vit skulu bert skriva navnið og nummarið á kreditkortinum, so kunnu vit fáa tað, vit hava hug til, alt frá bilum til rullupylsu. Enn er tó onki modem til, sum kann taka í móti rullupylsuni. Tíbetur kundi eg sagt.

Vinfólk míni sum eg sjálvur, vit hava alt! Og tað einasta eg hoyri tey og meg sjálvan siga, tá okkurt er, ein føðingardagur, útferð í hagan, at fara burtur eitt vikuskifti, lesa onkra bók, í biograf at síggja nýggjasta filmin, spæla í hornorkestri o.s.fr. er: EG HAVI IKKI TÍÐ!

Tað er vorið so í dag, at besta umberingin fyri ikki at fara á konsert, til framsýning, fyrilestur, í kirkju, á kjakfund, í biograf, á møti, syngja við kóri er ikki at hava tíð. Øll respektera eitt fólk, sum ikki hevur tíð, men vit hava onga respekt fyri tí fólki, sum gevur sær stundir til næstan hjá sær, stundir at vera saman við børnunum, stundir at standa á seiðabergi, stundir at lesa eina bók ella bara stundir til at vera til; og tað er eftir mínum tykki ógvuliga spell, ja, heilt burturvið!

Tíð er pengar er herrópið, og tað er kanska rættari enn flest okkara geva okkum stundir at hugsa um, men samstundis er tíðin tað einasta, vit øll fingu í vøggugávu fyri einki.

Eitt miðal mannalív í Føroyum varir í 30.000 døgn, og hetta er okkara persónliga ríkidømi. Tí er tað ikki rímiligt fyri menniskjað og heldur ikki virðiligt at góðtaka, at tíð er gjørd til skamt, tíðin kann ikki fatast sum ein trotvøra. Vit leggja lív okkara til rættis eftir lívsfilosofiini: eg arbeiði, gjaldi pensjónsuppsparing og leggi til síðis, og tá eg so verið eftirløntur, fái eg tíð til alt tað, eg ongantíð náddi í 20 til 67 ára aldrinum. Men hvør sigur at vit verða 67? Tá er tað spell at hava liva og onki upplivað. Eitt kent latínskt hugtak sigur *Carpe diem*, tak núðið, liva nú. Kanska skuldu vit hugsað eitt sindur um tað!

Hvar er so poengið í øllum hesum her? Jú, vit disponera yvir nøkrum, tíðini, sum vit ikki ráða yvir. Og tað er ein stórur munur. “Eg fari ikki at vitja ommu í dag, heldur ikki í morgin, tí kalendarin hjá mær er fullur, og tað passar mær øgiliga illa, men einaferð í næstu viku, tá fari eg.” Men hvat, í næstu viku kann omma gott verða deyð, ella tú sjálvur koyrdur yvir, tað vita vit ikki annað enn, at um so er, so er tað ov seint.

Vit kunnu og hava eisini lært, at ein kann fara í móti streyminum. Tað er strævið, men til tíðir neyðugt. Tá Ketil og Kálvur skuldu fara í grind á sinni, tá vildi Kálvur sleppa í bil og segði við pápan: “Pápi, hygg hvussu skjótt bilarnir fara.” “Klaga ikki - fram kemur hann, ið hóvliga fer. Nú skulu vit taka brekkuna so líðandi niðan á Háls. Vit hava ongan skund.” “Skulu vit ikki fara eftir vegnum, pápi,” spyr Kálvur og slær tærnar í ein stein. Nei, tað vildi Ketil ikki. “Tann gamla gøtan hevur verið nóg góð alla mína tíð, so man hon fara at hjálpast í dag við.” At ganga í móti streyminum ber til, men ikki ber til at ganga í móti tíðini.

Hóast stórar broytingar í samfelagsviðurskiftunum síðani *Klaksvíkar Hornorkestur* sá dagsins ljós fyri hálvtrýss árum síðan, og hóast orkestrið til tíðir hevur havt trupulleikar av ymsum slagi, so hevur tað altíð hórað undan, takka verið ikki minst stuðlinum frá fólkinum í Klaksvík. Eitt er at stovna orkestur, annað er at hava umstøður og pengar. Tann stóra vælvild og ikki minst hin fíggjarligi stuðulin, okkara kommunalpolitikarar ígjøgnum tíðirnar hava sýnt okkum, eigur lívi í orkestrinum. Tey, sum dag og dagliga hava givið sær stundir til orkestrið eiga tó størstu tøkkina!

Framtíðina síggja vit ljóst uppá, og um okkurt óvæntað hendir, so vænti eg at orkestrið megnar teir brotasjógvar, ið máttu komið. Sum ein av venjarunum hjá orkestrinum tók til, líka mikið hvat hendir, “The tune will linger on.” -Tónin livir víðari.

Til lukku Klaksvíkar Hornorkestur! Takk fyri øll somul, at tit lýddu á, og framhaldandi góða Norðoyastevnu.

**Andras Sólstein**





**Eingin væleydnað stevna uttan fitt børn í tjóðarbúnað**



**Frá skúðgonguni á Norðoyastevnu**



**Í ár vóru eisini fimleikarar við í skrúðgonguni**